## Neistin skal hanga í oddaliðnum

Neistin tekur ímóti StÍF í Sunset deildini hjá kvinnum sunnudagin. Gongdin hevur ikki verið so góð hjá Neistanum í seinastuni, har tær m.a. hava tapt tveir dystir ímóti Stjørnuni. Seinasta vikuskiftið fingu tær tó gongd á aftur við sigri á Kyndli. Hjá StÍF hevur ikki gingið væl. Tær hava tapt fimm dystir á rað, og seinast taptu tær stórt á heimavølli fyri VB. Nú er spurningurin, um StÍF klárar at steðga Neistanum. Seinast liðini møttust, var munurin ikki serliga stórur. Tá vann Neistin nevniliga við trimum málum, men undan dystinum má Neistin metast at vera stórfavorittur.

## Stjørnan stevnir ímóti FM

Stjørnan hevur veruliga fingið vind í seglini í Sunset deildini hjá kvinnum, og seinast tær vóru í dysti í bestu deildini vunnu tær á einum av hinum oddaliðunum, Neistanum. Nú taka tær so ímóti Kyndli í KÍ-høllini. Kyndil liggur á fjórða plássi í bestu deildini, men tær hava tó nøkur góð úrslit at vísa á í ár. Seinast tær spældu, vóru tær líka við at fáa stig ímóti Neistanum, men at enda gjørdust tær ov stuttar. Eingin ivi skal tó vera um, at Stjørnan er stórfavorittur undan dystinum, men Kyndil kann á einum góðum degi leypa hvøkk á oddaliðini.



KÍF-Mjølnir kvinnur:

## Stríðið um botnin

**KÍF og Mjølnir hava ligið og kappast í botninum í alt ár í meistaradeildini hjá kvinnum, og nú fær annað liðið møguleikan at leggja sjógv niður til hitt, tá liðini møtast í Kollafirði sunnudagin**

**FLOGBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bæði KÍF og Mjølnir hava havt tað trupult í meistaradeildini hjá kvinnum í ár. Tey liggja á ávikavist 5. og 6. plássi, men bæði liðini hava tvey stig.

Gongdin hjá KÍF hevur ikki verið nakað serliga góð í ár. Síðstu tríggir dystirnir eru endaðir við ósigri, og seinast tær vunnu, var ímóti Mjølni norðuri í Klaksvík. Trupulleikin hjá KÍF í ár hevur verið, at tær hava tapt ov nógvar dystir eftir javnbrótara. Heili 6 dystir eru taptir eftir javnbrótara, og tá er ikki lætt at savna nøkur stig saman.

Hjá Mjølnir hevur heldur ikki gingið so væl, og síðstu 4 dystirnir eru endaðir við tapi. Seinasti tær vunnu var á Giljanesi, tá tær møttu Drátti. Í dystinum ímóti KÍF hevur gingið hampiligt. Fyrsti dysturin í Kollafirði endaði við 3-1 sigri til Mjølnir, meðan KÍF vann seinna dystin í Klaksvík.

Sostatt verður lagt upp til satt brak í botninum á meistaradeildini hjá kvinnum sunnudagin.

TB-Dráttur kvinnur:

# Bæði royna at hanga í oddaliðnum

**Bæði TB og Dráttur hava brúk fyri einum sigri fyri at hanga í oddaliðnum, ÍF, í meistaradeildini hjá kvinnum, tá liðini bresta saman í Trongisvági sunnudagin**

**UPPTAKT**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Hvørki Dráttur ella TB hava ráð at tapa, um nøkur vón skal vera fyri at hanga í oddaliðnum*

Fleiri lið í meistaradeildini hjá kvinnum royna at hanga í klára oddaliðnum úr Fuglafirði, ÍF. Tvey av hesum liðunum bresta saman í vikuskiftinum, tá TB tekur ímóti Drátti í Trongisvági. Undan dystinum liggur TB á øðrum plássi, trý stig aftanfyri ÍF, meðan Dráttur liggur enn eitt stig aftanfyri TB á fjórða plássi. Dráttur hevur tó ein dyst til góðar.

Gongdin hjá TB hevur verið á góðari leið síðstu dystirnar, og teirra einasti trupulleiki hevur verið, at tær hava ikki megnað at bast oddaliðnum úr Fuglafirði. Tvær ferðir av teimum síðstu fýra hava tær møtt ÍF, og í báðum førunum hevur ÍF vunnið tryggan sigur – enn tá í báðum førum í Trongisvági.

Hjá Drátti hevur ikki gingið so væl síðstu dystirnar. Móti endanum av grundspælinum lógu tær á odda í bestu kvinnudeildini, men so steðgaði upp. Tap fyri Mjølni bleiv fylgt upp av enn einum tapi fyri TB, og so vóru tær ikki oddalið longur. Í fyrstu tveimum dystunum í endaspælinum hava tær fingið ein sigur og eitt tap, so nú er tær dotnar niður á triðja pláss við møguleika at fara fram við TB, um tær vinna útsetta dystin ímóti KÍF.

Í dystunum innanhýsis millum liðini hevur eisini leika javnt á. Fyrsti dysturin var sera javnur, men her megnaði Dráttur at draga longra stráið, tá tær vunnu 3-1. Í seinna dystinum var hinvegin eingin ivi. Her var TB nógv betra liðið, meðan Dráttur ikki fekk eitt bein til jørðina. TB vann eisini henda dystin 3-0.

Nú møtast liðini so aftur á Giljanesi, og áskoðararnir kunnu vænta ein spennandi dyst millum tvey lið, sum bæði ætla sær at spæla við í oddinum.

Fram-Mjølnir menn:

# Mjølnir spælir um meistaraheitið

**Mjølnir má vinna dystin, tá teir vitja hjá Fram í meistaradeildini hjá monnum. Um Fram ætlar sær at spæla við um FM-heitið, so er sigur eisini krav hjá teimum**

**FLOGBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mjølnir og ÍF liggja og kappast innanhýsis um meistaraheitið, og í løtuni liggur ÍF eitt stig ovari, tí hevur tað alt at siga hjá Mjølni, at vinna dystin sunnudagin, tá teir vitja í hjá Fram í Hoyvíkshøllini. Um Fram ætlar sær at spæla við um meistaraheitið, so er sigur krav hjá teimum ímóti Mjølni, tí tapa teir dystin, so hava teir at kalla ongan møguleika at vinna FM á hesum sinni.

Gongdin hjá gestunum úr Klaksvík hevur verið sera góð síðstu dystirnar í bestu mansdeildini. Teir hava ikki verið til at steðga, og síðstu sjey dystirnir eru endaðir við sigri til klaksvíkingarnar.

Hjá Fram hevur ikki gingið heilt eftir ætlan. Í grundspælinum haltaðu teir nakað langt aftanfyri bæði oddaliðini, ÍF og Mjølnir, og byrjanin uppá endaspælið hevur heldur ikki verið tann besta. Í fyrsta dystinum taptu teir á ÍF, meðan næsti dysturin endaði við sigri á SÍ, so í løtuni eru teir 5 stig aftanfyri ÍF.

**Mjølnir hevur havt takið**

Fram og Mjølnir hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir í grundspælinum, og í báðum førunum hevur Mjølnir havt yvirtakið.

Fyrra dystin vann Mjølnir 3-1 í Hoyvíkshøllini, og tá var sum so ongin ivi um úrslitið. Í seinna dystinum var heldur ongin ivi, tí tá vann Mjølnir tryggan 3-0 sigur í KÍ-høllini. So sigast kann, at Mjølnir hevur havt takið á Fram í ár, men sunnudagin fær Fram ein nýggjan møguleika at vinna á Mjølni.

Undan dystinum er Mjølnir favorittur, men Fram hevur tó eitt gott lið, og kann uttan iva vinna, um teir raka dagsformin.